# Skraddari í hálva øld

**Árni Gærdbo hevur starvast sum skraddari í næstan 50 ár. Í dag hevur hann Skraddaratænastuna í Sverrisgøtu, og ætlanin er at halda fram, so leingi heilsan er til tess**



*Árni Gærdbo hevur starvast sum skraddari í næstan 50 ár. Hann ætlar sær at halda áfram, so leingi sum hann hevur heilsuna til tess*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Trillur og knappanálir í hópatali eru at síggja, tá ein trínur inn í Skraddaratænastuna í hjartanum í miðbýnum í Havn. Fram við vegginum hanga klæðir. Klædningsjakkar, leðurjakkar, buksur og annað hanga eftir einum stativi. Alt er merkt við lítlum seðlum.

Árni Gærdbo hevur starvast sum skraddari í næstan 50 ár. Upprunaliga er hann úr Vági, men í samfull 27 ár hevur hann búð í Íslandi, har hann lærdi til skraddara. Ein farri av suðuroyarmáli og íslendskum er at hóma aftur í hansara tosingarlagi.

Sjálvt um Árni ikki longur seymar nýggj klæðir, so hevur hann úr at gera dagliga.

– Fyri ein eldri mann er hetta ikki so galið. Eg seymi bara smáting nú. Leggi buksur upp og skifti snarlás og so framvegis, sigur Árni Gærdbo, sum leggur afturat, at hetta er tað, honum dámar best.

## Hazy-virkið

Inni í skraddarastovuni standa fýra maskinur. Tvær vanligar seymimaskinur, sum í skraddaraheiminum verða kallaðar fyri industry maskinur.

Umframt tær báðar er ein maskina, ið verður brúkt til at leggja upp við og ein over-look maskina.

– Mær dámar mítt arbeiði ógvuliga væl. Men eg taki tað púra róligt nú. Ein kann væl siga, at hetta er mítt ítriv, greiðir Árni frá.

Hann hevur ígjøgnum ár og dag seymað fyri nógv fólk.

Beint við seymimaskinurnar hongur ein stór plakat. Hon er av trimum gentum, sum standa úti í føroysku náttúruni. »Hazy« stendur niðast á plakatini.

Seinast í sjeytiárunum stovnaði Árni Gærdbo nevniliga sítt egna virki á Velbastaðvegnum. Virkið legði seg mest eftir at seyma cowboybuksur, og tá hevði skraddarin 25 fólk í starvi. Umframt tað, so hevði hann fleiri handlar runt um í Føroyum.

– Tað vísti seg tó, at tað bar seg ikki at hava eitt slíkt virki í Føroyum. So vit góvust eftir eini fimm ár, sigur Árni.

## Góðir kundar

Tá Árni fór í læru, vóru tað bara menn, ið lærdu til skraddara.

– Tá var tað óvanligt, at konufólk lærdu til skraddara. Men í dag eru tað bara konufólk, ið fara í læru.

Hann veit ikki um nakran annan mann í dag, sum er útbúgvin skraddari á sama hátt, sum hann sjálvur. Fyri at gerast ein góður skraddari krevst tað sambært Árna eitt gott handalag og stórur neyvleiki, tí tað er so nógv smáputl.

Síðani hann varð útlærdur seinast í fimtiárunum, hevur hann arbeitt sjálvstøðugt. Bæði í Reykjavík og í Havn. Seinastu sjey árini hevur hann hildið til í Sverrisgøtu, men áðrenn tað var hann á Kirkjuvegi úti á Reyni.

– Í mínum starvi hittir tú nógv fólk hvønn dag. Og nú, tá eg ikki leiki so nógv í, so hevur tú altíð tíð til at taka tær eitt prát.

Árni sigur, at hann hevur fleiri fastar kundar, ið venda aftur ferð eftir ferð.

– Tað er ógvuliga stuttligt at síggja. Eg havi nógvar góðar kundar.

## Heldur fram

Skraddarin fortelur, at fyri at gerast góður innan hetta yrkið, so krevst eitt gott handalag og stórur neyvleiki, tí tað er

– Aðrir menn byrja at rógva út, tá teir verða eldri. Men hetta er tað, eg havi valt at gera. Og eg ætli mær at halda fram, so leingi eg havi heilsuna til tess, fortelur Árni. Hann leggur afturat, at enn er ikki farið at bila við eygunum.

So hvønn morgun um átta-hálvgum níggju tíðina leggur hann leiðina oman í Skraddaratænastuna. Á middegi heldur hann ein døgurðasteðg, og frá klokkan 13 heldur hann so áfram til klokkan 17.





Fyribils halda vit til á Bóndaheygi 4

Her hava vit træverju, betongmáling, veggjamáling v.m.

Vit hava eisini parkettgólv og vinylgólv umframt baðirúmsvinyl

máling & gólv

TEL 316066

Sosialurin 341800




VIT REINSA:
KLÆÐIR · GARDINUR · MØBLAPÓLSTRING
TEPPIR · EISINI REINSA VIT ARBEIÐSBÚNAR

OPIÐ:
MÁNADAG - FRÍGGJADAG KL. 10.00 - 17.00
LEYGARDAG KL. 09.00 - 12.00

GISTING Í MIÐBÝNUM:
EINKULT OG DUPULT RÚM. EISINI SUMMARÍBÚÐ

RUBA REINSARÍ
MAGNUS HEINASONARGØTA 15 · 100-TÓRSHAVN · TEL/FAX 31 63 01
FARTEL 22 28 47 · RUBA@POST.OLIVANT.FO

Sosialurin 341800




STÓRA SUMMARÚTSØLAN
byrjar mánamorgunin 26. juli kl. 10.00

OPIÐ ER TIL KL. 20.00

ØLL ÚTSØLUVØRA -50%

ROKOKO
512 NORÐRAGØTA · TEL 441 039



Øllum føroya fólki verður ynskt eina góða ólavsøku


Annika
ER AFTURKOMIN

HÁRFRÍÐKANARHØLLIN
TEL 31 34 49 · HOYDALSVEGUR 40